## Læknarnir ikki tíð at greiða frá

Læknarnir á teimum donsku sjúkrahúsunum hava ikki nóg góða tíð til at tosa við sjúklingarnar, og tí eru samrøðurnar ofta alt ov stuttar. Eitt nú vísir tað seg, at á krabbameinsdeildini á Ríkissjúkrahúsinum hava yvirlæknarnir bara nakrar minuttir til at greiða einum sjúklingi frá einari álvarssamari sjúku. Ein av yvirlæknunum, Niels Kromann, sigur við kringvarpið DR, at hann hevur vanliga 20 minuttir til ein sjúkling, men tá hann er liðugur at kanna tey ymsu skjølini, eru kanska bara einir sjey minuttir eftir til at siga sjúklinginum frá niðurstøðuni og avleiðingunum. Sjálvur sigur læknin, at tað ber ikki til at geva ta neyðugu frágreiðingina eftir so stuttari tíð.

## Brúgv kostar 100 mia. krónur

Í fleiri ár hevur verið tosað um møguleikarnar at gera eina brúgv tvørtur um Kattergat fyri at stytta farleiðina millum Keypmannahavn og Århus, men fyribils hendir neyvan nakað á tí økinum. Ein ráðgevandi fyritøkan hevur kannað málið, og hon sigur, at tað eru fleiri møguleikar, men at ein Kattegat-brúgv fer at kosta millum 100 og 137 milliardir krónur aflt eftir, hvør leið verður vald. Fyritøkan sigur, at skal brúgvin fíggjast á sama hátt sum sambandið um Stórabeltið, fer tað at kosta 870 krónur fyri ein persónvil at koyra annan vegin. Higartil hevur verið mett, at 450 krónur er tað mesta, sum fólk vilja góðtaka.

# Café Vágsbotn riggar av

**Vit komu seint í gongd, men cafein royndist so mikið væl, at vit heilt vist lata upp aftur 1. mai næsta ár, sigur Johannus Jensen, stjóri**

VÁGSBOTN
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað tók drúgva tíð at fáa Café Vágsbotn upp á beinini. Tað dróg út við loyvunum, og cafein opnaði ikki fyrr enn 4. juli.

Loyvið er annars galdandi frá 1. mai til 31. august, og tað er eigarin sjávur, Johannus Jensen, sum hevur søkt um hesar fýra mánaðirnar.

- Tað kundi verið ynskiligt, at loyvi var galdandi longri tíð, so vit kundu havt opið til serlig tiltøk í Vágsbotni, ella jólamánaðin kanska. Eg ivist ikki í, at bæði loyvisnevndin og býráðið høvdu játtað, um søkt varð um tað, sigur Johannes Jensen.

Stjórin á Hotel Føroyum og Hotel Tórshavn sigur annars, at caféin er ógvuliga væl móttikin og at tey hava fingið nógvar positivar viðmerkingar.

- Vit hava havt nógvar útlendingar á cafeini gjøgnum dagin, bæði ferðafólk og útlendingar annars. Men veðrið hevur alt at siga, og eg haldi, at vit hava verið rættiliga heppin við veðrinum, sigur Johannes Jensen.

Sjálvandi hava dagarnir verið ójavnir. Summir hava givið undirskot, men tað hava sanniliga eisini verið dagar við yvirskoti.

- Tað, at vit fara at lata upp aftur komandi ár, sigur nakað um, at tað loysir seg at hava opið. Og vit ætla at gera okkum enn betri út til komandi ár, sigur Johannes Jensen.



*Teir riggaðu av á Café Vágsbotni í gjár*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Meiri lív í

Stjórin á Café Vágsbotn sigur, at tað hevur verið alt ov stutt opið í ár, tí tað gekk so long tíð, áðrenn øll loyvini vórðu í lagi.

- Uppstarturin er altíð dýrur, vit skulu gera íløgur í bæði køk, blómur, borð og stólar. Og so høvdu vit teir byrjunartrupulleikar, sum altíð eru. Men vit lata upp aftur næsta ár, og tá ætla vit at betra um konseptið, bæði við matarskrá og øðrum, sigur Johannes Jensen.

Hann heldur annars, at nógv meiri lív er komið í Vágsbotn.

- Bæði á Ólavsøku og í heila takið er komið mundandi meiri lív í í Vágsbotni, sigur Johannes Jensen.

Fiskatorgið hevur sjálvandi gjørt sítt til, og býráðið hevur boðað frá, at tað ætlar at hugna um, ikki bara í Vágsbotni, men í Tórsgøtu sum heild. Og Johannes Jensen ætlar at gera sítt til at hugna um, og 1. mai næsta ár letur Café Vágsbotn upp aftur.

# Frægari til av náta

**Væl meira av havhestaungum er komið undan í ár í mun til seinasta ár. Hetta vísa teljingar hjá Fiskirannsóknarstovuni, sum verða gjørdar í Høvdanum í Skúgvi**

NÁTATÍÐ
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í vár og í juni vórðu taldir 384 og tað er 27% fleiri enn seinasta summar. Eisini vóru fleiri reiður, 269 í tali, og tað er 37% fleiri enn seinasta ár.

Størsti vøksturin er tó í talinum av ungum. Til samans vóru 123 ungar í seinastu viku og tað er 98% fleiri enn seinasta summar.

Talið av ungum er annars minkað spakuliga síðani 2001, tá ið 171 ungar komu undan. Í 2007 hendi tó ein óvanliga stór minking niður í bert 62 ungar, men hetta talið er nú vaksið aftur til 123, so nú er tað uppi á einum meira vanligum støði.

Um støðan er tann sama um alt landið sum í Høvdanum í Skúgvi, so skuldi meira verið at fingið av havhestaungum enn í fjør, men tað velst eisini um veður og vind.

Ungarnir verða taldir stutt áðrenn teir eru floygdir, og í Høvdanum síggjast teir væl, tí her heldur havhesturin til á rókum og spíldum. Hvør einstakur fuglur verður merktur inn á myndir, og tilsamans eru gott 300 reiðir ella pláss, har havhestar halda til, men teir verpa tó ikki í øll reiðrini á hvørjum ári.

Tað hevur ikkið verið sigið í Høvdanum síðani 1974, so fuglurin verður ikki órógvaður av fólki, og rotta er ikki í oynni. Hvussu nógv kemur undan av havhestaungum í Høvdanum veldst tí mest um, hvussu nógv føði er at fáa til ungarnar. Tað hevur sostatt verið munandi meira føði til havhestin í ár enn seinasta ár.

### Betri, men…

Jens-Kjeld Jensen, fuglafrøðingur í Nólsoy, sigur, at eisini í Nólsoy er støðan hjá nátanum betri í ár, enn hon var í fjør.

- Eitt stað, sum eg í fjør taldi 11 ungar, havi eg talt 16 í ár, so nátin er yvirhøvur betri fyri í ár enn í fjør. Men hyggja vit 20 ár aftur í tíðina, er bert helmingurin til av náta í dag í mun til tá, sigur Jens-Kjeld Jensen.

Hann vísi til, at bátarnir í dag ganga so nógv skjótari enn teir gjørdu fyri 20 árum síðani.

- Bátarnir tóku 200, 300 ella 400 nátungar fyri 20 árum síðani, og teir skjóttgangandi bátarnir í dag taka tað sama, sigur Jens-Kjels Jensen.

Men tað sær betri út í ár enn tað hevur gjørt tey seinastu árini.

- Eisini støddin á nátungunum er javnari í ár.



*Nátin er betri fyri í ár enn undanfarin ár, men stovnurin er bert ein helmingur at tí, hann var fyri 20 árum síðani*

Tey seinastu árini hava teir verið ógvuliga ójavnir í støðd, summir væl fyri, meðan aðrir hava verið ógvuliga rak. Teir nátungar, sum eg havi sæð her í Nólsoy í ár, hava verið rættiliga javnir í støðd, sigur Jensw-Kjeld Jensen.

So støðan er sum heild betri í ár enn undanfarin ár, men munandi verri enn fyri 20 árum síðani.